gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

## GM færri verk-smiðjur



General Motors verða noyddir at steingja 3 av teirra 29 bilverksmiðjum í USA. Orsøkin er at teir hava alt ov nógvar óseldar bilar á goymslu.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Dansk Shell flytur

Dansk Shell flutti tann 25.februar úr tí søguliga bygninginum "Shell-huset", í miðbýnum í Keypmannahavn, har teir hava húsast seinastu 67 árini. Undir krígnum brúktu týskarar húsið til høvuðsstøð, og í 1945 bleiv húsið bumbað av Royal Air Force. Nýggja høvuðsskrivstovan hjá Dansk Shell er í Nærum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Volvo leiða arbeiðið



Volvo Personbiler í Gøteborg skulu leiða og menna arbeiðið við mobil-kunningartøknini á luksusbiladeildini hjá Ford, »Ford Premier Automotive Group"« (PAG), ið fevnir um bilmerkini: Jaguar, Land Rover, Lincoln og Aston Martin.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

# Sp/f Vaktargarðurin bjóðar seg fram við nýggjari tænastu

**Á Sp/f Vaktargarðinum í Havn hava teir í longri tíð havt ætlanir um at fáa sær ein hjálparbil við í teirra annars fjølbroytta virksemi. Nú er ætlanin blivin veruleiki, og fólk kunnu ringja til Sp/f Vaktargarðin, um tey hava brúk fyri hjálp til eitthvørt, sum hevur við bilin at gera**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Erling Larsen, ið er bilmekanikari, fer at hava hjálparbilin undir hond*

*Mynd: Jens K. Vang*

Sp/f Vaktargarðurin víðkar nú virksemi sítt við at teir hava fingið sær ein hjálparbil, har fólk kunnu ringja og fáa veghjálp, alt eftir hvat tørvurin er. Um t.d. bilurin er støðgaður upp fyri bensin, er punkteraður, skal á verkstað, ella at tað av aðrari orsøk er brúk fyri hjálp. Eisini hjá teimum sum eru til arbeiðis ella eru burturstødd og bilurin skal á verkstað, kunnu tey boða Sp/f Vaktargarðinum frá, so heinta teir bilin og fáa hann á verkstað til ásettu tíðina.

### Umbygdur til hjálparbil

Maðurin, sum fer at hava bilin undir hond, er Erling Larsen, ið er bilmekanikari, og hevur hann tískil tann førleika, sum skal til fyri at røkja hesa uppgávuna. Tað eru teir báðir John William Old og Brynleif Askildsen, ið hava bygt ein VW LT kassavogn um til at kunna flyta bilar. Hjálparbilurin hevur eitt spæl til at hála bilarnar upp á eina rampu, sum teir koyra inn eftir. Tey, sum hava brúk fyri hjálparbilinum, kunnu ringja til Sp/f Vaktargarðin tel. 314488 ella beinleiðis til bilin á tel. 288488.

### Alarmsentralurin

Umframt vaktarhald hjá privatfólki, á fyritøkum, virkisbygningum og umborð á skipum, fer mangt annað um alarmsentralin hjá Sp/f Vaktargarðinum. Teir selja, installera og projektera alarmar, ið eru í beinleiðis sambandi við alarmsentralin, sum til dømis oljufýrtilknýti, sum sigur frá, um oljufýrið er steðgað, eisini um iltnøgdin er sum hon skal á teimum alibrúkum, teir hava samband við, alarmar í lyftum, brandalarmar, tjóvaríalarmar og yvirfallsalarmar. Eisini hava teir avtalu um parkeringsvakt, og stýra ferðsluni á parkeringsplássunum hjá SMS, Rúsdrekkasøluni, Norðurlandahúsinum, Tórshavnar Havn og aðrastaðni, tá nógv ferðsla er.



*Erling Larsen og Bjarni Thomsen framman fyri nýumbygda flutningsbilinum*

*Mynd: Jens K. Vang*



VIÐMERKINGAR

# Kvinnur/menn

**Gunna Thomsen**

Kvinnudagurin er farin aftur um bak. Nær er forrestin mannadagurin? (orðið stendur ikki í orðabókini).

Vit hava fingið at vita, at ongin kvinna er í leiðandi starvi í Føroyum, sambært Útvarpi Føroya 08.03.01, og Augustu Mikkelsen í Sosialinum 10.03.01.

Tað tykist løgið at lesa og hoyra, at ongin kvinna er í leiðandi starvi.

1. Hægsta starv í Føroyum – skrivstovustjórin í Løgtinginum – er KVINNA.
2. Hægsta starv í Landsstýrinum – skrivstovustjórin – er KVINNA.
3. Ríkisumboðið er KVINNA.
4. Stjórin á Almannstovuni er KVINNA.
5. Stjórin á ALS er KVINNA.
6. Stjórin á Rúsdrekkasølu Landsins er KVINNA.
7. Stjórin í Norðurlandahúsinum er KVINNA.
8. Apotekarin í Havn er KVINNA.
9. Apotekarin í Klaksvík er KVINNA.
10. Stjórin á størsta hotelli í Føroyum er KVINNA
11. Av trimum líkastillaðum stjórin á Landssjúkrahúsinum eru <u>tvær KVINNUR.</u>
12. Stjórin á Handilsskúlanum á Kambsdali er KVINNA.
13. Stjórin á Eysturskúlanum (størsta fólkaskúla í landinum) er KVINNA.
14. Skúlastjórin á Giljanesi er KVINNA.
15. Skúlastjórin í Kollafirði er KVINNA.
16. Skúlastjórin í Skopun er KVINNA.
17. Allir barnagarðar í Føroyum eru stýrdir av KVINNUM.
18. Allar deildir (sjúkraróktin) á sjúkrahúsunum eru stýrdar av KVINNUM.
19. Ellis- og røktarheim (minus eitt) eru stýrd av KVINNUM.
20. Hvíldarheimið er stýrt av KVINNU.
21. Øll sjúkrarøkt í Føroyum er stýrd av KVINNUM.
22. Øll heim í Føroyum eru stýrd av KVINNUM.
23. ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRIN á Dimmalætting var KVINNA, men er nú vald í politiskt starv.
24. Í mínum nærumhvørvi: Prestur er KVINNA. Keypmaðurin er KVINNA.

Vestmanna kommuna varð einaferð stýrd av monnum. Øll vita hvussu har gekst. Kvinnur í býnum tóku sær um reiggj og væl gekk. Vestmanna kommuna er nú stýrd av kvinnum og nú stendur væl til har.

Farið ein túr til Kollafjarðar. Borgarstjórin *var einaferð* KVINNA. Mannfólk komu síðan til, og hvar er Kollafjarðar kommuna í dag? BURTUR!!!

Góðu kvinnur í Føroyum, verið góðar við heim tykkara, børn tykkara og ikki minst við menn tykkara. Latið teir so bara gera tað skitna arbeiði. Tá vit hava fingið loysingina, skulu vit kvinnur nokk standa klárar at hjálpa og redda stumparnar eins og kvinnurnar í Vestmanna gjørdu á sinni.

# With God on our side

**Hans Jensen**
*Hvalvík*

Endelig blev løsningssagen – uden løsninger – hævet op på et højere åndeligt plan, hvor den hele tiden har hørt hjemme.

### Den menneskelige løsning

At sætte almindelige dødelige til at behandle et så spirituelt emne som løsrivelse fra Danmark, har fra starten været en alvorlig fejlvurdering. Denne hellige sag er blevet forplumret af gemene, men såre menneskelige svagheder som magtbegær, penge, olie og prestige.

Det har været en farlig kamp. Flere af korsfarerne har sat liv og lemmer på spil og nogle har mistet både ansigt, arme og ben, og andre har fået ekstra næser, men ufortrødent har de fortsat deres heroiske kamp, og det eneste der endnu mangler er: martyriet. Men nu er næsten nået i mål.

At blive martyr er nu heller ikke at foragte. Så bliver man nævnt i radioen en morgen hvert år. Denne dag hedder Håbet fra Hoyvík – han tabte ansigt for sin tros skyld i det Herrens år o.s.v.

Og så er der historiebøgerne, hvor man vil blive nævnt sammen med de andre store ideologer og de små børn vil blive eksamineret i ens lidelseshistorie.

Alt i alt – ikke noget helt dårligt resultat efter tre års intensivt arbejde med akademiske luftkasteller.

At den menneskelige formående er begrænset fremgår tydeligt af ovenstående så derfor glæder det mig usigeligt at Landsstyret denne gang er gået uden om Nyrup, Nato, EF, SMS, FN og Menneskerettighedskommitionen i Haag og har lagt alt i Guds Hånd.

### Den Guddommelige løsning

Som det forstås har koalitionen nu sammensat et panel bestående af: Jesus fra Esbjerg, Buddha fra Viðareiði, Ghandi fra Hoyvík og Gud selv. Det forlyder at P.O.K.O. skal være ordstyrer.

Nu skal der nok komme gang i sagerne.

Et godt råd til de over 50%, der ikke beder for koalitionen: Hold en lav profil indtil den salomoniske dom er faldet: Skulle Gud virkelig vise sig at være tjóðveldismaður, ser det ikki godt ud i det regnskab, vi en gang skal aflægge for St. Peter.

Du må ikke misbruge Herren, din Guds navn – hvor søren, er det nu det står skrevet?

# Hin tigandi samfelagsbólkurin

**Torfinn Hentze**

**Fullveldi - blokkstuðul - og tann tigandi samfelagsbólkurin av veikum, gomlum brekaðum. Áheitan á landsins myndugleikar.**

Vit hoyrdu nú um dagarnar í fjølmiðlunum nakrar av landsins fólkavaldu kjakast um fullveldisætlanina og í tí sambandi minking av blokkstuðlinum frá Danmark. Nevnt varð, at vit uttan trupulleikar væl høvdu ráð til at minka blokkstuðulin frá Danmark. Nevnt varð, at vit uttan trupulleikar væl høvdu ráð til at minka blokkstuðulin – eg haldi talið 300 mill. kr. um árið tey næstu árini varð nevnt.

Loysing ella ikki loysing – um blokkurin skal minkast 300 mill. kr. ella okkurt annað líkandi krónutal um árið, tað skal eg ikki taka støðu til á hesum sinni.

Men fari í hesum sambandi í staðin fyri at loyva mær at áminna teir fólkavaldu, at áhugafeløgini hjá teimum brekaðu og tá serliga hjá teimum menningartarnaðu og sinnisbrekaðu eins og tey, sum varða av teimum óhjálpnu gomlu, fleiri ferðir í vetur greitt hava víst á og prógvað yvir fyri avvarðandi myndugleikum, at alt ov stórur partur av hesum tigandi samfelagsbólkum og teirra avvarðandi er illa staddur og hevur alstóran tørv av ymiskum slag, sum ikki verður nøktaður í dag vegna ov pírnar játtanir á landsins fíggjarlóg. Svarið áhugafeløgini á fundum teirra hava fingið frá politikarum hevur rúmað stórum forstáilsi og mangan føgrum orðum, men tá ræður um krónur og oyru í verki, so hevur verið sagt, at fíggjarliga støðan ikki loyvdi meira hesuferð, at man politiskt ikki kundi semjast um meira hesuferð ella onkrar aðrar líknandi undanførslur.

Minking av blokkstuðlinum 300 mill. kr. um árið tey næstu árini uttan trupulleikar verður sagt, samstundis sum mannsømiligar liviumstøður hjá nógvum brekaðum og gomlum óhjálpnum og teirra avvarðandi eru ómøguligar vegna vantandi játtanir á landsins fíggjarlóg. Er ikki okkurt her, sum ikki hongur saman? Og er ikki stór andsøgn í hesum?

Loyvi m tí við omanfyristandandi sum grundarlagi at biðja landsins myndugleikar bíða – bara eitt einasta ár – við at byrja uppá hesa minking av blokkstuðlinum og ístaðin nýta tær 300 mill. kr., ið verða spardar – bara tað fyrsta árið – til at nøkta tann tørv, sum ein alt ov stórur partur av brekaðum og gomlum hava fyri at fáa mannsømiligar liviumstøður.

# KARISMA

**Samtak av fríum evangeliskum samkomum**

TÍÐINDASKRIV

Fyri eini tíð síðani gjørdu 6 ymiskar samkomur í Føroyum eitt samtak av fríum evangeliskum samkomum, ið m.a. skal virka fyri at arbeiða saman viðvíkjandi stórum felagstiltøkum s.s. fundarøðum, seminarum v.m. Hesar samkomur eru: Betania, Skopun, Keldan, Skálabotnur, Lívsins Orð, Runavík, Evangeliihúsið, Havn, Samkoman Rhema, Havn, og Filadelfia í Havn.

### Nýggjar samkomur uppí

Síðani samtakið varð stovnað hevur verið arbeitt við at fingið fleiri samkomur upp í felagsskapin og er hetta eydnast. Higartil eru tvær samkomur komnar upp í afturat og eru tað: Zion í Vági og Saron í Vestmanna. Roknað verður við, at fleiri samkomur fara at koma uppí, sum tíðin líður.

### Stór felagsmøtir í Læraraskúlahøllini

Eitt av endamálunum við samtakinum er at kunna skipa fyri stórum felagstiltøkum runt landið, har fleiri samkomur eru við. Ætlanin er at gera nýtslu av føroyskum kreftum mest møguligt. Komandi vikuskiftið, 16.-18. mars, verða stór møtir í Læraraskúlahøllini í Havn, har Samtakið KARISMA alment verður proklamerað. Møtini verða fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18.

### 130.000 kr. til Lindina

Leygarkvøldið verður eitt serligt kvøld, har kekkur áljóðandi kr. 130.000 verður handaður umboðum fyri Lindina. Leiðslan fyri Karisma hevur gjørt av at lata hsa gávu til ein sendara til Suðuroynna, so eisini suðringar kunnu hava møguleika at hoyra kristna útvarpið. Mett verður, at ein slíkur sendari kostar umleið 130.000 krónur.

### Skipar fyri stórum evangeliskum tiltøkum

Annars kann eisini upplýsast, at skipað verður fyri stórum evangeliskum fundarøðum í apríl og á hvítusunnu.

Í apríl kemur kendi afrika evangelisturin úr Kenya, Teresa Wairimu, til Føroya. Hon er ein Harrans tænari, ið samlar upp til fleiri hundrað túsund fólk á møtirøðum sínum í Afrika. Stór undur og tekin og grøðingar henda, meðan hon prædikar. Henda fundarøðin verður í Ítróttarhøllini í Runavík í døgunum 20.-22. apríl.

### Aril Edvardsen til Føroya á hvítusunnu!

Stóri kendi norski evangelisturin Aril Edvardsen kemur til Føroya á hvítusunnu at halda stóra evangeliska kampanju í Ítróttarhøllini á Nabb. Tað eru nógv ár síðani, at Aril hevur verið í Føroyum, men nú kemur hann so aftur. Síðst hann var fylti hann Ítróttarhøllina. Aril Edvardsen er m.a. kendur fyri sítt sera stóra missiónsarbeiði runt allan heimin í yvir 200 londum. Sarons Dal hevur í dag umleið 1300 innføddar trúboðarar – harav fleiri verða undirhildnir úr Føroyum. M.a. er eitt stórt satelittarbeiði eisini í gongd. Hetta satelitt arbeiði nær stórt sæð allan tann muslimska heimin, uml. 1,2 milliardir menniskju. Eisini hevur Aril skrivað yvir 40 bøkur.